# Skemt

## The Simpsons í grind



TEKNING: OLE WICH

## Kanska átti skeltið at verðið flutt nakrar metrar?




***Brot úr oddagrein í Dimmalætting 20. januar 2011***

Við fyrsta setninginum: »Formaðurin roynir at fáa stýr á flokkinum«, skrivar blaðstjórin á Dimmu, Árni Gregersen soleiðis:

»Umframt at vera vanligur tingmaður verður **Jørgen Thomsen** eisini formaður í fíggjarnevndini«
Seinni skrivar hann: »At formaðurin í Fólkaflokkinum leggur starvið sum **landsstýrismaður við fíggjarmálum** niður, kann eisini hanga saman við...«

Kanska fyrsti setningurin heldur áttið at verið:

**»Blaðstjórin roynir at fáa stýr á politikarunum«**

## Í RANGASTRÚPAN

**Tað var sanniliga uppá tíðina**
Bárður Bendix vunnið fyrsta steypið!
***Portalurin***

**Hvussu við sprossum fyri vindeyguni, lásum o.a.**
Varðhaldið kann ikki flyta beinanvegin, tí teldur o.a. skal setast til fyrst.
***Portalurin***

**Hvat tosa teir so um?**
Partarnir samtala, men talan er ikki um beinleiðis samráðingar.
***Norðlýsið***

**Er tað fysiskt møguligt?**
Somu kort í Klaksvík, Havn og Hovi
***Norðlýsið***

**Ger hon eisini sendingar í klæðum?**
Victoria Wild var fult ílatin í sendingini.
***portalurin***

**Hvat eru tey so?**
Tilboðini eru í fleiri førum als ikki tilboð.
***Suðurrás***

**Var størsti ruðulleikin ikki um teg sjálvan, Gerhard?**
Tað valdar ruðulleiki í landinum
***Gerhard Lognberg á Sandportal.fo***

**Er Levi ein perla?**
Ein perla komin til Tórshavnar bý: Levi Mørk, býráðslimur
***sandportal.fo***



**Hava tey ongan talsmann?**
Línuskipini krevja samráðingar
***Dimmalætting***

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Gjøðingsstuntur

Sjálvandi bar ikki til at gera eitt heimskort á føroyskum ella føroyskum ella føroyskum uttan tað obligatoriska klandrið og stríðið.

Tað er eisini púra ørt at kroysta allan heimin í eina bók. Ikki minst, tá hann longu er á netinum á flestu málum.

Ísland, sum er fimm ferðir størri enn Danmark, fekk fýra ferðir so nógv pláss sum Danmark í nýggja føroyska atlassinum. Og so var eldur i samríkisskálanum. Hann logar enn.

Danmark eigur mesta plássið á einum føroyskum heimskorti. Hvat tá? Tí nógvir føroyingar vita ikki, at onnur lond enn Danmark eru til.

Varð eg biðin um at vera við í hesum heimsskaðiliga arbeiði, tað verði eg sjálvandi ikki, men um so var og í og fyri seg og alt annað líka, so hevði eg fyrst av øllum kannað, um Føroyar yvirhøvur vóru á kortinum.

Fyrimyndin er ensk, og bretska arrogansan kann sum einki »gloyma« Føroyar á einum heimskorti, hóast bretar vistu, at Føroyar vóru til í 1940. Men tað var tá, langt fyri globaliseringina. So tað hevði eg kannað fyrst. Eru Føroyar har?

Eitt annað stríðsmál er málið í heimsatlassinum. Skal tað vera føroyskt, føroyskt ella føroyskt.

Eiga vit at umseta øll nøvn? Í Albania til dømis siga tey Republika e Shqipërisë um sítt land. Hví skulu vit so siga nakað so banalt og ósexut sum Albania? Tí tað gera tey í Danmark sjálvandi. Albania ljóðar sum pínupillarar. Tak tvær albania um morgunin og drekk vatn afturvið.

Útlendingar umseta ikki okkara staðarnøvn, tey fáu sum eru, í teirra atlassum. Tórshavn eitur gamaní Torshavn, ikki longur Thorshavn, men so als ikki Torsharbour. Ella Klaxbay. Hvat høvdu vit, stolta tjóð, sagt, um land okkara kallaðist Sheep Islands í teimum útlendsku atlassum, har tað er við. Men Godthåb eitur kortini Nuuk.

Og Lambi eitur Lamba, men Sumba eitur ikki Sumbi. Posta eitur ikki Posti ella Skopun.

Vónandi fer Málráðið, um tað kemur, at brúka tað diktatoriska vald, sum tí er givið í lógini, og siga, at vit gera trý heimskort, eitt á føroyskum, eitt á føroyskum og eitt á føroyskum.

Í Føroyum er eitt heimskort ikki landafrøði, men málfrøði sum øll onnur frøði í Føroyum.

Tíðindaflutningur er ikki journalistikkur, men málfrøði.

Nýggja gandaorðið er stunt. Stunt er sambært Donsku-føroysku orðabókini stuntur (vandamikið verk gjørt av gjøðingi). Jørgen Niclasen er ein gjøðingur. Hvat er so ein gjøðingur. Her eru boð eftir fleiri orðabókum. Føroyska orðabókin sigur, at gjøðin er at vera vágin, forsin, dittin, dittimundur. Nú noyðist lesarin sjálv/ur at leita víðari í orðabókini.

Tjóðveldi gjørdi skjótt av og kom eisini við einum stunti, ella stuntprnummari, sum tað eisini eitur á føroyskum. Javnaðarflokkurin kundi fáa forkvinnuna í Fíggjarnevndini.

Tað er sera lætt hjá politiskum gjøðingum í Føroyum at fremja stunt, tí fjølmiðlarnar bíta á og spæla við hvørja ferð. Undirhald er altíð vælkomið og væl dámt.

Tað er bara at kunngera, at vit hava týðandi tíðindafund. Og ikki siga, um hvat tíðindafundurin er.

Teskaði nakar klandur? Tjóðarsemjan, breiða semjan, er farin upp á A. Ein vil ikki vera við longur, tí hann vil heldur hava eina grundlóg fyri óføddar føroyingar. Okur fostrini í lívmóðurini.

Vit hava longu eina fína stjórnarskipan, Gamla testamenti.

Ein annar er fornermaður, tí alt ov fáar paragraffir eru.

Og so segði hasin Løkke bøøøøøøøøøøøøøøø.

So trillrunt alt er í Føroyum, fáa vit einki atlas, men ein globus.